## DAGSINS MEINING

# Trípartasamráðingar

Tað er lítið at ivast í, at nógv av tí, sum nú gongur fyri seg innan karmarnar av tí hugtaki, ið nevnist trýpartasamráðingar er taktikkur og nervakríggj. Snildur taktikkur frá arbeiðsgevarunum, sum ikki fer at virka, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum og ávarar bæði politikarar og arbeiðsgevarar ímóti at leggja Starvsmannafelagið undir trýs Hann er á varðhaldið, nú arbeiðsgevarar hava kallað arbeiðarafeløgini til nýggjan fund um trýpartasamráðingar við landsstýrið um kostnaðarstøðið í Føroyum. Tað er sostatt greitt, at Starvsmannafelagið sum nú er, verður neyvan við i eini trýpartaloysn. Tað er eisini ivasamt, um arbeiðarafeløgini eru samd um ætlanina. Eitt av teimum stóru arbeiðarafeløgunum, Havnar Arbeiðskvinnufelag, er atfinningarsamt og FA hevur verið ógvuliga varið. Hinvegin tykist HA at verða rættiliga positivt. Tá alt hetta er sagt, so stendur eftir, at trýpartahugtakið hóast alt er áhugavert og ósiðbundið, og kanska er tað júst slíkum hugskotum okkum tørvar í hesum døgum.

Hvat snýr alt hetta seg veruliga um? Hetta snýr seg um, at landsstýrið, arbeiðsgevararnir og partar av fakfelagsrørsluni óttast tað hækkandi kostnaðarstøðið. Hesir partar bera ótta fyri, at vit missa framleiðsluna til lond við lægri kostnaðarstøði, les lægri lønarlagi. Skrekkvisiónin er norska fiskivinnan, sum flytur sína framleiðslu heilt til Kina og danski ídnaðurin, sum flytir sína framleiðslu til Eystureuropa. Trýpartaloysnin skuldi so verið tann, at fáa fakfeløgini vissu fyri skatta- og avgjaldslætta til lá- og meðalinntøkur, so vilja tey slaka munandi við lønarkrøvunum til komandi samráðingar. Vinningurin skuldi so verið eitt munandi lægri kostnaðarstøði innan privata eins væl og almenna sektorin. Harvið skuldu vit fingið bøtt um okkara kappingarføri. Alt hetta skuldi so tryggja arbeiðsplássini.

Hetta er ein freistandi loysn, sum á fakmáli nevnist inntøkupolitikkur, ið so uppaftur hevur sum fortreyt, at allir partar spæla við. Men her eru nógvir leysir endar og nógvir trupulleikar. Henda loysn gevur minni í landskassan, og tað fær beinanvegin fylgjur fyri alla almennu skipanina, heilsuverk, almannaverk, skúlaskipanina, íløgurnar o.m.a. Hartil koma tær søguligu royndirnar, sum vísa, at skatta- og avgjaldslættar bert halda í eina tíð. Hvussu skal tað almenna kunna veita trygd móti skatta- og avgjaldshækkingum í einum skeiði við vaksandi búskapartrupulleikum? Hvat við prísunum, sum landsstýrið ikki er harri yvir? Hvørja trygd hava løntakararnir fyri, at ein trýpartasemja ikki fer at venda tunga endanum niðureftir o.s.fr.? Jú víst eru nógvir ósvaraðir spurningar. Hinvegin er hetta eitt áhugavert hugskot, ið eigur at verða roynt. Fæst ikki semja og fæst ikki tann neyðuga trygdin, vendist altíð aftur til tað gamla.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bland kom í orðini

**Øssur Winthereig, tíðindaleiðari**
*Sjónvarp Føroya*



Ein sum nevnir seg Virgar T. Dalsgarð, hevur í bløðunum roynt at sett eitt ótal av føroyskum orðum saman í eina lesbara raðfylgju. Í tí royndini er bland komið í nøkur av orðunum. Eitt nú sigur hesin greinskrivari, at sjónvarpið og Grækaris Magnussen eltu ein smádrong vestur á flogvøllin. Nógv sjáldsom orð vera knýtt upp í sjónvarpið og Grækaris í hesum sambandi.

Fyri fólk, sum ikki hava møguleika dagliga at fylgja við í Føroyum, er skjótt at seta orð saman eftir ímyndingarevni heldur enn veruleikanum. Tí skal eg hjálpa greinaskrivaranum eitt sindur.

Hvørki sjónvarpið ella Grækaris vóru á flogvøllinum, tá Petur fór av landinum. Grækaris legði heldur ikki rødd til tíðindini í sjónvarpinum hetta fríggjakvøldið. Eitt nú tí hann var staddur í Danmark.

Kanska blandar greinskrivarin við okkara systurstovn – útvarpið - sum valdi at vera á flogvøllinum og fylgja Peturi avstað.

Sjónvarpsins sjakalar:

# Ætlaðu naivt statskvett fyri jól

**Virgar T. Dalsgard**



***(framhald frá mikudagsblaðnum)***

***(Framhald av greinini, Sjónvarpsins sjakalar)***

Nú kann kanska onkur andøva ímóti og halda, at hesin góði Grækaris vísti seg sum ein mann í fjør, tá ið hann beint uppundir jól gav út bókina »Skjót journalistin« saman við harra Øssuri Winthereig, einum øðrum turrgeldum egocentrikara. Vóru hetta ikki raskir dreingir, sum herjaðu á sitandi løgmann? Var her ikki talan um samfelagsmál og maktmisbrúk hjá einum manni, sum sat við stórum valdi? Gaman í, men bókin skuldi, um hon skuldi hava nakran relevans verið skrivað fyri meira enn tjúgu árum síðani. Tá var málið aktuelt, og sjakalarnir komu ikki fram við rættiliga nógvum, sum fólk ikki vistu longu fyri nógvum árum síðani. Tá ið hesir bádir vágaðu sær fram við bókini, var tað avgjørt ússaligt »post festum» og bara feikur konstaterandi gulur journalistikkur, sum allarhelst var »bestilt arbeiði» frá høvuðkambunum allarovast í tjóðveldisflokkinum. Teir vóru nevniliga so naivir, at teir billaðu sær inn, at tjóðveldið kundi fáa løgmann, og so skuldu hesir báðir journalistgarpar hava gilt afturfyri. Motivið var týðuligt - persónlig maktgirnd hjá bádum bókagørpum!

Í staðin fyri hava hesir báðir politiserandi mikrofondreingir, harra øssur & harra grækaris komprommitterað seg so, at teir aldri aftur áttu at sloppið framat einari almennari mikrofon. Teir eru djúpt óseriøsir sum journalistar, lívegnir ørindadreingir hjá tjóðveldisflokkinum og andiliga trúlovaðir við allari tí maktsjúku Hoydalsklikuni. Teir hava tí púra eingi moralsk rættindi til at fáast við tíðindafluttning - teir kundu kanska fingið innivist á meinigheitsblaðnum hjá tjóðveldisflokkinum, Fregnir. Í tí blaðkøstinum hoyra triðja rangs journalistar heima. Bókin »Skjót journalistin» er so illa skrivað, at sjálvt ein smáttbegávaður sjeynda-klassa næmingur hevði skammast við slíkt fuskarbeiði.

### Ommu-effektin brúkt sum politisk pressión

Skandalu- og sensatiónsjournalistikkurin hjá sjónvarpinum hevur í allarseinastuni fingið parlamentariskar konsekvensir, bæði á Løgtingi og Fólkatingi. Fyri stuttum stillaðu harra Bill Justinussen og Finnur Helmsdal hykleriskar spurningar á tingi um smádrongin hjá sjónvarpinum. Teir kendu væl svarið frammanundan, men teir kundu jú fáa gruggað málið eitt sindur við at leggja

*Framhald á síðu 11*

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 10*

ónossligt trýst á parlamentarikararnar. Fyri at seta rættiligan trumf á, høvdu hesir báðir farisearar fingið dragsað ommu drongin niðan í tingið. Omman sat so á áhoyraraplássinum og økti um parlamentariska trýstið! Hetta er beinleiðis emotionellur terror móti føroyskum løgtingsmonnum. Harra Helmsdal hevur sjálvur sum barnaverndarformaður sent eitt ótal av børnum til Danmarkar - hann veit betur enn nakar, at tað er einki óregluligt hent í smádreingja-málinum, men hann letur seg brúka sum hent tjóðveldisamboð hjá sjónvarpsins sjakalum! Populistar sum Bill og Helmsdalur spilla tingsins kostbaru tíð. Seinni hevur so medicinmaðurin Jenis av Rana, leiðarin av farisearaflokkinum eisini blanda seg uppí!

Tað, sum Helmsdalur troystar sær á løgtingi, loyvir Hoydalur sær á Fólkatingi. Harra Høgni Hoydal er so langt úti nú, at hann hevur á sjálvum Fólkatingi reist málið um drongin, sum skal til Danmarkar. Sum um hetta lítla ommumál hoyrir heima á ministara-niveau! Soleiðis sum Høgni grætur fyri donskum ministarum, mugu vit útisetar næstan fáa varhugan av, at drongurin skal deporterast til Devlaoynna. Hetta er mest mikroskopiska mál, nakar politikari enn hevur spilt tíðina hjá einum donskum ministara við. So tað lukkaðist enn einaferð harra Høgna at gera øllum føroyingum fyri skommum og seta sítt egna met í perfidari populismu og emotionellari demagogi

Sjálvt ikki Erlendur Patursson fekk seg til at stilla so idiotiskar spurningar, hóast hann aloftast ferðaist í tí demagogiska køstinum!

### Smakkleys populisma á Fólkatingi

At andstøðuleiðarin, harra Høgni Hoydal er farin so á knøini, at hann fær seg til at promovera seg við so smáum málum, vísir bara, at hann antin er steinbýttur ella er í desperatari neyð. Spurningurin, hann hevur stillað donskum ministarum er so óintelligentur, at vit skullu heilt aftur til abba hansara, Karstin Hoydal fyri at finna nakað líka so politiskt tápuligt.

Landsstýrismaðurin Karstin Hoydal vildi, sum kunnugt í síni tíð hava løgtingsmenn at viðtaka, at hann ikki hevði drukkið annað enn sodavatn í kantinuni í Mjørkadali. Hesum groteska uppskoti kundu sjálvt partamenn hansara ikki taka undir við, tí teir vistu av góðum grundum ikki, hvat ið hevði verið í Karstinsglasi. Men fjákutari spurningur hevur ikki verið stillaður nakrantíð av føroyskum politikara, fyrr enn nú abbasonurin Høgni hevur dummað seg á Fólkatingi. Mikroskopiska lítið statsmansevni er í slíkum skølingum!

Hevur nakar hugsað um at skipa fyri einum árligum farisearaprísi til Føroya størsta hyklara? Um so var, hevði kappingin verið knívshvøss millum teir fimm pseudofilantropisku umsorgarmenninar, Grækaris, Høgna, Finn, Jenis og Bill. Allir høvdu verið favoritkandidatar. Hesir pásetligu sjálvgóðu menninir ætla at bjóða seg fram sum eitt kvalificerað alternativ til teir socialu myndugleikarnar. Ja, tað hevði verið nossligt, ha?! Er eingin, sum skammast vid okkara perverterada og vamlisliga sjónvarp? Megastørsta menniskjansliga skommin eru avgjørt teir bádir farisearararnir, Grækaris og medicinmadurin Jenis, men harra Hoydal er landaskommin, nú hann er farin at ómaka danskir ministarar vid pseudomálum! Harra Hoydal er eiggiliga dumpadur sum parlamentarikari, men hann hevur stadid allar royndir og næstan met sum perfidur populistur, perversur provokatørur og fjadursárur hyklari. Eingin, sjálvt ikki hansara egnu kunnu taka hann í álvara sum politikara eftir hetta!

Høvdu allir hesir úlvar í seyðaklædum fingið nakað socialt vald, hvat Harrin forbjóði, so hevði ein stórur partur av tjóðini blivið socialir klientar. Latum okkum verja fólkið móti hesum óhumsku, maktsjúku og følsku profetum! Latum okkum avdúka hesar falsarar! Lat okkum skræða gekkaskortin av teimum, so fólkið sær, hvussu spillnaknir teir eru! Her átti sjónvarpið at gingið á odda!

Brennistøðir kenna hitan:

# Rúkandi trýst genererar luftigar leysasøgur

**Leysasøgur um at stjórin á IRF hevði skal hava sagt seg úr starvi, geva eina mynd av tí hita sum brennistøðirnar á Hagaleiti og Hjalla mugu kenna, nú deadline nærkast fyri innføringina av nýggjum reinsiskipanum fyri tíggjutals um ikki hundraðtals milliónir**



*Nógv trýst er á IRF í løtuni, men tað tykist so ikki vera hald í søgunum um, at stjórin í felagsskapinum skal hava sagt upp*

UMHVØRVI
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Tá vit mikudagin ringdu til IRF og spurdu um tað passaði at stjórin har, Poul Andrias Joensen, hevur sagt seg úr starvi, hvakk avgreiðslufólkið á brennistøðini við. – Hvat sigur tú? Hevur hevur hann sagt seg upp nú? ljóðaði ein skelkað rødd. Nei, stjórin var ikki at hitta heldur.

Hinvegin var formaðurin í IRF nevndini, Hilmar Danielsen, væl og virðiliga at hitta. Skjótur at avnokta ta sokallaðu uppsøgnina, vísti hann til tað trýst sum leiðslan hjá IRF, og fyri so vítt eisini tann hjá KOB í Havn, nú hevur á sær sum úrslit av herdum umhvørvisligum krøvum ið skjótt koma í gildi.

– Hatta við at Poul Andrias skal hava sagt seg úr starvi, er íspunnið. Eg hevði verið tann fyrsti hann hevði sagt tað við, so mikið kenni eg hann; eg havi eisini tosað við hann um hasi leysatíðindini og einki hald er í teimum. Tey kanska hinvegin hanga saman við at fundir fyri tíðina kunnu vera nakað rokaligir og onkur hvøss orð munu falla.

### Tveyfrontað stríð

Nevndar formaðurin greiddi frá at IRF liggur í tí hann kallaði - einum tveyfronta stríði í samráðingum um implementeringina av nýggjum ES reglum sum koma í gildi longu um eitt gott ár.

– Sæð út frá einum rakstrarligum sjónarmiði, liggja vit í løtuni í einum tveyfronta stríði, við teimum umhvørvisligu myndugleikunum frá Innlendismálaráðnum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni øðrumegin og teimum fíggjarligu myndugleikunum frá Fíggjarmálaráðnum hinumegin. Okkara uppgáva er at fáa tær reglurnar sum koma í gildi við árslok 2005 so hampiliga hóskandi fyri okkara rakstur sum møguligt, soleiðis at vit kunnu megna at liva upp til tær og samstundis kunnu fáa til vega nóg mikið av peningi til at kunna innføra neyðugar skipanir.

Sum skilst er talan um eitt rásarúm fyri tulking upp á millum 25 og 100 milliónir krónur.

– Íløgurnar sum krevjast í sambandi við tey herdu krøvini um roykfiltrering kunnu variera millum 25 og 100 milliónir; tað verður í síðsta enda ein spurningur um prioriteringar og tulkingar. Vit hava í áravís ávarð um hesa støðuna, og at ein skipan fyri roykfiltur ið lýkur altjóða standard inniber eina sera stóra íløgu umframt ein nakað dýrkaðan rakstur. Fyrst nú er eftir øllum at døma málið vorðið nóg heitt.

*Hvussu gongur annars fíggjarliga hjá IRF?*

- Vit framdu rationaliseringar fyrr í ár og spardu seks ársverk; tað ger nógvan mun. Síðani eru bingjuplássini úti hjá kommununum vorðin umskipað við millum annað betraðari sortering, og har spara vit eisini pening. Sum heild er tann fíggjarliga stýringin rættiliga væl optimerað. Men fyri tíðina hongur alt í leysari luft so at siga, orsakað av teimum herdu reglunum sum nú koma; tað er einki at siga til at orðadrátturin kann gerast nakað harður viðhvørt.

Verandi fíggjarlóg hjá IRF javnvigar við umleið 60 milliónir krónur, upplýsir nevndar formaðurin.